Ítróttar
Sosialurin
Nr. 86 • hósdagur • 4. mai 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Landsliðsvenjarin fer at sakna Inga Højsted



– Ingi hevur rættiliga spælt seg inn á liðið, og hann hevur verið eyðsýndur seinastu landsdystirnar. Tí er tað ómetaliga spell, at hann nú møguliga verður uttanfyri í eitt ár, sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari

**– Um Ingi Højsted ikki fær spælt fótbólt í eitt ár, verður tað ein stórur missur fyri landsliðið. Hann er sentralur í tí spælistílinum, sum eg ætlaði at arbeiða við á landsliðnum, sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Ingi Højsted hevur eftir øllum at døma slitið krossbandið í høgra knæið. Ein lækni kannaði Inga mánadagin, og hann var ikki í iva. Tann minimali ivin, sum kann verða um skaðan, skal ruddast á vegnum týsdagin, tá ið ein danskur lækni við kunnleika til slíkar skaðar, skal kanna Inga á Landssjúkrahúsinum.

Landsliðvenjarin Jógvan Martin Olsen hevur havt regluligt samband við Inga Højsted seinastu dagarnar, og hann hevur framvegis eina lítla vón um, at boðini týsdagin kunnu verða betri, enn tey vóru mánadagin, men tað er ikki nógv, sum bendir á tað.

– Um Ingi Højsted ikki fær spæ lt fótbólt í eitt ár, verður tað ein stórur missur fyri landsliðið. Hann er sentralur í tí spælistílinum, sum eg ætlaði at arbeiða við á landsliðnum, sigur Jógvan Martin Olsen.

## Øgiliga synd fyri Inga

20 ára gamli Ingi Højsted er rættiliga feskur á a-landsliðnum, men hann hevur eftir stuttari tíð spælt seg inn í landsliðshitan. Ingi spældi fyrsta landsdystin í 2003, og síðani hevur hann verið fimm ferðir á vøllinum.

– Ingi hevur rættiliga spælt seg inn á liðið, og hann hevur verið eyðsýndur seinastu landsdystirnar. Hann hevur verið serliga góður í presspælinum, og eg havi rættiliga roknað við honum næstu tíðina. Tí er tað ómetaliga spell, at hann nú møguliga verður uttanfyri í eitt ár, sigur Jógvan Martin Olsen.

– Hetta er eisini øgiliga synd fyri Inga sjálvan, tí eftir at hann varð skuffaður av tíðini í Birmingham, kom hann heimaftur at spæla og ætlaði sær avstað aftur til útlandið í næstum. So persónliga føli eg við honum.

## Rættiligt gjøgnumbrot

Ingi Højsted hevur seinastu árini verið millum fremstu ungu spælararnar í Føroyum. Hann fór blaðungur til Arsenal at venja, og har var hann í fleiri ár, áðrenn hann kom heimaftur til B36 í fjør.

Har fekk hann rættiligt gjøgnumbrot í føroysku fótbólti, gjørdist stuðulsspælari í B36 og vann FM í fyrstu royndini.

Ingi kom eisini á landsliðið og gjørdist eftir ongari tíð fastur spælari. Í vár var hann í Birmingham og hann ikki veruliga kjansin, og fyri nøkrum vikum síðani gjørdu partarnir av at gevast við samstarvinum.

Tí var Ingi komin heimaftur at spæla fyri B36, men tað skuldi ætlandi bara vera í eina tíð. Útlendsk feløg hava framvegis áhuga fyri honum, og gekk tað sum ætla, so skuldi Ingi av landinum aftur í summar.

Nú er alt fyribils sett í bíðistøðu, tí Ingi fær neyvan spælt aftur næsta lítla árið.

**FAKTA**

**Ingi Højsted**
**Føddur:** 12. november 1985
**Bústaður:** Hoyvík
**Feløg:** B36, Arsenal, Birmingham City
**A-landsdystir:** 4 dystir/0 mál
Føroyameistari við B36 í 2005

## Skúlakapping í talvi

**Eins og undanfarin ár, skipar Talvsamband Føroya í mai og juni mánaði fyri FM liðkapping fyri skúlaungdóm**

TELVING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Eins og undanfarin ár fer Talvsamband Føroya at skipa fyri FM liðkapping fyri skúlaungdóm. Kappingin er skipað soleiðis, at telvt verður um FM heitið í 2 aldursbólkum: 4. flokkur og yngri og 5. flokkur og eldri .

Innleiðandi kappingar verða á Oyrarbakka og í Klaksvík, meðan finaluumfarið verður í Skopun. Sera hugaligt, at FM finala í talvi, á fyrsta sinni, verður telvað á Sandoynni - og enntá í heimbygdini hjá okkara sterkasta telvara í løtuni, altjóða meistara okkara IM John Arna Nilssen.

At finaluumfarið júst verður í Skopun, er ikki minst eitt úrslit av megnar ungdómsarbeiðinum hjá talvráðgevanum hjá Talvsambandinum, Mogens Nielsen - ikki minst á Sandoynni - har rættiliga nógvir ungdómar luttaka í skúlatelvingini, sum annars støðugt breiðir seg kring landið alt. Talv er av álvara á veg inn um skúlagátt.

FM finalubólkar fevna um 6 tey bestu liðini í hvørjum aldursbólki frá innleiðandi kapp ingunum. Tey lið sum ikki kvalifiserað til finaluna, ella sum ikki luttaka innleiðandi, telva í opnum bólkum í finaluni um plaseringar og heiðursmerki.

Á hvørjum liði eru 4 telvarar. Tó ber til at hava í mesta lagi 2 skiftistelvarar - t.v.s í mesta lagi 6 á hvørjum liði.

Fyrra innleiðandi kapping verður í Oyra skúla fríggjadagin 12. mai. Seinna innleiðandi kapping verður í Klaksvík hósdagin 25 mai. Finalan verður í Skopun mánadagin 5. juni.

Heiðursmerki verða til hvørja kapping latin trimum teimum bestu liðunum í hvørjum aldursbólki. FM vinnarar fáa harumframt steyp til ognar. Kappingarnar eru fyri allar áhugaðar talvungdómar - royndar, minni royndar, umframt fyri tey sum júst eru byrjaði at telva - tað er ikka at halda seg aftur, sigur Talvsambandið